**Álit**

**í**

**løgtingsmáli nr. 16/2018: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt (Skattalógin) (Útgjaldið úr Samhaldsfasta skattafrítt)**

Joen Magnus Rasmussen hevur, vegna Fólkaflokkin, lagt málið fram 10. september 2018, og eftir 1. viðgerð 27. september er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum 13., 16. og 19. november 2018.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Landsfelag Pensjónista, Kommunufelagið og landsstýrismannin í fíggjarmálum.

Nevndin hevur undir viðgerðini býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

**Meirilutin** (Ruth Vang, Pauli Trond Petersen, Kristin Michelsen og Helena Dam á Neystabø)
vísir á, at tá uppskotsstillarin sigur, at tað er ein feilur, at AMEG verður skattaður við inngjaldi og útgjaldi, so er hetta ikki rætt. Veruleikin er, at hetta er ein skipan, sum verður nýtt til allar okkara sosialu skipanir og er politiskt tilvald. Upprunaliga fekk skattgjaldarin skattafrádrátt svarandi til inngjaldið í AMEG, men við sokallaðu bruttoskattaskipanini í 1996 kom ein botnfrádráttur í staðin fyri flest allar frádráttir, og í øllum førum fyri inngjaldið til AMEG og ALS. Serliga Fólkaflokkurin var fortalari fyri hesi nýggju skipan.

Meirilutin vísir á at roknistykkið, uppskotsstillarin hevur sett upp, kann geva lesaranum eina skeiva fatan av veruligu støðuni. Inngjaldið frá arbeiðsgevaranum, sum stendur fyri helminginum av inngjaldinum í AMEG, er ikki tikið við, heldur ikki avkastið. Haraftrat velur uppskotsstillarin hægsta marginalskatt á 50% sum fortreyt fyri inngjaldi, ein fortreyt sum bert er galdandi fyri inntøku oman fyri kr. 800.000 um árið.

Annars heldur meirilutin, at tað skal støðugt metast um, hvørt skattatrýstið á inntøkur, herundir pensjónir, kann lækka, og at tað eigur at verða gjørt í tann mun, tað ikki hevur við sær óforsvarligar avleiðingar fyri fíggjarstøðu hjá landi og kommunum, sum aftur ávirka neyðugar vælferðartænastur.
Tá ið pensjónsnýskipanin varð samtykt vóru høvuðsendamálini at tryggja pensjonistum við lágum og miðalinntøkum væl meira at liva fyri, eins og tað hevði stóran týdning at bøta um haldførið í búskapinum. Nýskipanin tryggjar verandi pensjonistum uml. 1000 kr. meira at liva fyri um mánaðin – og komandi pensjonistum (aftan á nýskpaninan fær gildi) uml.1500 kr. meira at liva fyri um mánaðin. Samstundis sum haldførið batnar munandi komandi árini. Pensjónsgjøldini fara at verða prístalsjavnað, og tað fer at løna seg betur at arbeiða á ellisárum enn nú. Meirilutin heldur, at uppskotið um at gera útgjaldið úr AMEG skattafrítt er í sær sjálvum áhugavert, men vil heita á uppskotsstillaran at koma við einum meira fullfíggjaðum uppskoti, har hann eisini fyriheldur seg til avleiðingarnar av uppskotinum.

Tað eru fleiri sjónarmið um støðið á vælferðartænastum og harav fylgjandi skattatrýsti, men tað er sjálvsagt, at eitt uppskot, har land og kommunur missa inntøkur á knappar 200 mió, kann ikki standa einsamalt. Tá skal serliga havast í huga, at kommunurnar hava fá skattlig stýringaramboð og tískil má væntast, at kommunurnar við so ógvusligum inntøkumissi í

einum, antin hækka kommunuskattin, lækka barnafrádráttin, lækka støðið ella hækka gjøld á kommunalum tænastum so sum dagstovnum. Landið hevur fleiri møguleikar at kompensera fyri inntøkumissin, men hann fer at merkjast so ella so.

Meirilutin tekur tí ikki undir við málunum og mælir Løgtinginum frá at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Gerhard Lognberg, Jacob Vestergaard og Bill Justinussen) vísir á, at AMEG skal eitast at vera ein av grundsúlunum undir pensjónsskipanini, sum skal vera við til at tryggja pensjonistum eina rímiliga pensjón.

Veruleikin er tó tann, at AMEG er vorðin ein pengamaskina hjá lands- og kommunukassum, heldur enn ein grunnur, sum skal hjálpa pensjonistunum. Hetta er eisini komið týðiliga til sjóndar undir viðgerðini, tí meirilutin hugsar meira um, hvat land og kommunur skulu fáa burtur úr grunninum, enn at veita pensjonistunum ein kærkomnan styrk.

AMEG er í veruleikanum ein skattur, sum verður kravdur frá arbeiðsgevarum og løntakarum. Í staðin fyri at lata henda skattin fara óskerdan til pensjonistarnar, verður stórur partur av honum brúktur til alt annað enn útgjald til pensjonistar. Tí er umráðandi at rætta skeivleikan, so allir teir skattaðu pengarnir, sum borgarin hevur goldið, fara óskerdir til pensjonistin.

Lógarbroytingin er eitt kærkomið ískoyti hjá pensjonistum, sum fáa 2000 skattafríar krónur meira at liva fyri um mánaðin.

Við hesum viðmerkingum mælir minnilutum Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Fíggjarnevndin, 20. november 2018**

Ruth Vang
formaður

Gerhard Lognberg

Helena Dam á Neystabø

Kristin Michelsen

Pauli Trond Petersen

Jacob Vestergaard

Bill Justinussen